




# Nýtt umfar av SATSA í gongd

**Í mai mánaði verður farið undir upptøkurnar av næsta umfari av sjónvarpssendingini SATSA hjá Sjónvarpi Føroya. Sum heild er sjónvarpsstjórin, Mikkjal Helmsdal, væl nøgdur við sendingina nú hon endaði leygarkvøldið**

SJÓNVARP
*Ingrid Bjarnastein*



*Tóra Winther Reinert gjørdist endaligi vinnarin av sjónvarpskappingini SATSA, sum SvF hevur sent síðani í vetur. Leygarkvøldið var finalan, og nú er sjónvarpið longu farið í holt við at finna luttakarar til eitt nýtt umfar*

*Mynd: SvF*

Leygarkvøldið var finalan í sjónvarpskappingini SATSA, sum Sjónvarp Føroya hevur sent síðani í heyst. Vinnarin av stóru finaluni og teimum 50.000 túsund krónunum gjørdist havnargentan, Tóra Winther Reinert.

– Vit eru rímiliga væl nøgd við hetta fyrsta umfarið. Sendingin var ikki rættiliga liðug, tá vit byrjaðu uppá upptøkurnar í fjør, men sum heild eru vit væl nøgd, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri.

## 2. umfar

Nú verður lýst eftir luttakarum til 2. umfar av sjónvarpskappingini hjá Sjónvarpi Føroya. Nakrar broytingar vera á skránni, so meira spenningur kemur í.

– Vit fara at broyta endaumfarið eitt sindur. Tað hevur sært rættvísiskensluna hjá fleiri, at tú sum »tapari« kanst koma í finaluna og fara avstað við vinninginum. Tí skal tað gerast eitt sindur torførari, greiðir sjónvarpsstjórin frá.

Harafturat verður stigskipanin broytt og vinningarnir. Í undanfarnu sendingum hevur tað verið soleiðis, at vinnarin av hvørjum innleiðandi umfari hevur vunnið 2000 krónur, og um hann er sloppin við í triðingsfinaluna og aftur vunnið har, hækkaði vinningurin upp á 5000 krónur.

– Eisini verður mátin broyttur, hvussu alt er bygt upp tá til endan. Higartil hava vit havt ein topp 10 lista, men hann hevur ikki fanga so nógv, tí sendingarnar hava koyrt yvir so langa tíð. Men hetta er alt liður í eini menning, sum vit eru í holt við at tosa við framleiðaran, Blu Entertainment um.

## 40% hugt

Í miðal hevur rating-talið hjá SATSA ligið um 40%. Tað vil siga, at umleið 13-14000 túsund føroyingar hava leygarkvøld klokkan 20 sitið frammanfyri skíggjanum og hugt eftir SATSA, og hetta er sjónvarpsstjórin væl nøgdur við.

– Sjálvandi kundu vit hugsað okkum at fingið talið hægri upp, og tað fer tað kanska, tá vit hava strammað sendingina upp nú, tá næstu upptøkurnar byrja, sigur Mikkjal Helmsdal.

Møguliga verður talan um at skifta vert, men hetta vil sjónvarpsstjórin tó ikki gera víðari viðmerkingar til. Onki er avgjørt enn, sigur hann.

Sum sagt, so verður nú lýst eftir luttakarum til 2. umfar av sendingini. Sambært Mikkjali Helmsdal, so vóru tað nóg mikið, men tó ikki so nógv, sum meldaðu seg til SATSA í fjør. Men nú fólk kenna spælið, væntar hann, at fleiri tilmeldingar fara at koma.

Upptøkurnar til hetta umfarið vóru gjørdar í fjørvár, og ásannar sjónvarpsstjórin, at hetta er long tíð hjá luttakarunum at bíða við at halda ein loynidóm. Men tað er tó gingið væl, heldur hann.

– Fólk skuldu skriva undir uppá, at tey ikki skuldu siga, hvør hevði vunnið tað umfarið, tey vóru við í, og tað hevur hildið væl. Eg havi í øllum førum ikki hoyrt um nakran, sum hevur sagt, at hetta ikki hevur riggað, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri at enda.

